AGANEVNDIN

**KÆRA 8/2011**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: AB kærir FC Suðuroy fyri at nýta ólógligar leikarar** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 13.08.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 23. august 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

## 1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

AB hevur kært FC Suðuroy fyri at nýta ólógligar leikarar í dysti millum AB og FC Suðuroy tann 13. august 2011 í 2. deild menn.

Í kæruni vísir AB á, *"at FC Suðuroy nýtti minst tveir ólógligar leikarar í dystinum"*. Talan er um leikararnar Rene Thomsen nr. 11 og Ingi Poulsen nr. 14.

FC Suðuroy er hoyrt í málinum og vísir á, at Rene Thomsen er skrásettur sum leikari hjá FC Suðuroy og at Ingi Poulsen er uppvaksin í felagnum og hevur leikt øll ungdómsárini í VB og VB/Sumba. FC Suðuroy vísir á, at Ingi Poulsen er skrásettur á heimasíðuni www.faroesoccer.com og at hetta má síðustillast við skráseting í leikaraskráseting FSF's.

## 2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 3. Fakta í málinum

Tann 13. august 2011 varð dystur leiktur millum AB og FC Suðuroy í 2. deild menn. Leikararnir Rene Thomsen og Ingi Poulsen leiktu sambært dómaraseðlinum fyri FC Suðuroy.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin Rene Thomsen er skrásettur sum leikari hjá FC Suðuroy. FSF skrivstovan upplýsir somuleiðis at leikarin Ingi Poulsen ikki er skrásttur í leikaraskráseting FSF's.

## 4. Lógarverkið

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

## 5. Staðfestingar, metingar, o.t.

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki, sbrt. grein 15, stk 3 í

Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað. Aganevndin staðfestir, at leikarin Ingi Poulsen ikki er skrásettur í leikararskrá FSF's sum lógligur leikari hjá FC Suðuroy.

**6. Niðurstøða**

Leikarin Ingi Poulsen leikti ólógliga í dystinum tann 13. august 2011 millum AB og FC Suðuroy, sbrt. grein 15, stk. 3 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður FC Suðuroy, 2. deild menn dømt at tapa dystin móti AB tann 13. august 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 26. august 2011**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna